# Hjarta var báðu megin

*Millum teirra, sum saman við 12. manni riggaðu til, tá farast skuldi til landsdystin, var í øllum førum ein, sum var eitt sindur í tvístøðu um, hvørjum liði hann skuldi halda við.*



JÁKUP MØRK

Talan er um 22 ára gamla sveisaran, Jan Siegwalt, sum í nógv ár hevur havt sera stóran áhuga í Føroyum.

Ja, somikið stórur er áhugin, at hann hevur lært seg málið, og hetta var fyrst og fremst orsøkin til, at nú var saman við 12. manni.

- Júst nær eg fór at hava serligan áhuga fyri Føroyum, dugi eg ikki at siga við vissu, sigur Jan, tá vit spyrja hann, hvussu tað ber til, at hann soleiðis hevur lagt als á oyggjar okkara.

- Eg hevði sera stóran áhuga fyri fløggum, og var tað tá, at eg av fyrstan tíð legði merki til Føroyar. Hesin áhugin er ikki vorðin minni við árunum. Fótbólt dámar mær eisini væl at hyggja at, so a eg skuldi ogna mær eitt føroyskt flagg, fekk eg fatur á tykkara 12. manni, og soleðis kom sambandið í lag okkara millum.

Jan lesur annars búskaparfrøði á universitetinum í heimbýi sínum, Lüzern, men hetta er so ikki tað einasta, sum ber til at lesa á staðnum. Errin greiðir hann frá, at tað nú eisini er gjørligt at lesa føroyskt. Nakað sum er komið í lag fyri stuttum, eftir at tað annars bert hevur verið eitt samlað skeið fyri norðurlendskt.

Víðari sigur hann, at nú hann er saman við 12. manni, hevur hann endiliga fingið møguleikan at hoyra føroyskt. Nakað sum ikki er gjørligt umvegis orðabókina.

- Eg havi millum lítið og einki hoyrt av føroyskum máli, og tí er hetta eitt kærkomið høvið hjá mær til tess. Eg havi annars havt samband við eina gentu úr Vestmanna umvegis alnetið, men tað hevur so verið tað heila, segði Jan, sum ongantíð sjálvur hevur verið í Føroyum.

- Eg ætli mær tó at koma onkuntíð, og møguliga verður hetta komandi ár, tá Sveis skal til Føroyar at spæla.

### Hjálpti til

At Jan er fegin um hendan møguleikan, sum hann nú hevur fingið, tykist heldur ikki at vera nakar ivi um.

Sum nevnt, so hevur hann áður havt samband við 12. mann, tá eitt flagg skuldi keypast, og nú áskoðararnir eru komnir til land hansara, hevur hann eisini gjørt nógv burturúr, soleiðis at teir skulu kenna seg væl.

Fríggjadagin var hann sostatt ferðaleiðari hjá føroyingunum, tá hesir fóru heimbý hansara, Lüzern, og eisini skipaði hann fyri eini ferð upp á eitt stórt fjall nærhendis býnum.

Takksemið frá 12. manni var eisini stórt, og Regin Egholm, formaður, vísti á, at tá men fekk slíka hjálp, lætti tað øgiliga væl um, tá ferðirnar skuldu fyriskipast.

Regin vísti tó eisini á, at tað er úr fleiri londum, at áhugi er fyri Føroyum, og hann var so als ikki var í iva um, at fótbótslandsliðið var eitt hitt besta umboðið, sum føroyska tjóðin kann hugsa sær.

### Riggaðu til

Sum tað eisini sæst á myndunum, so riggaðu føroysku áskoðararnir seg rættiliga til leygardagin. Teir høvdu funnið sær eitt slag av miðdepli á eini enskari pub í býnum, og eigarin her var somikið bliður, at lata upp tíðliga leygardagin, so føroyingarnir sluppu inn.

Máling, fløgg og líknandi varð síðani riggað til, og tað er einki at taka seg aftur í, at rómurin var góður, tá teir við trummunum á odda settu kós móti Stadion Hardturm, har dysturin varð leiktur.

Jan var eisini við í hesum, men sum sæst á andlitsmálingini, so var hann tó eitt sindur í iva um, hvørjum hann skuldi halda við.

Spurdur um hetta svaraði hann, at hann ikki kundi siga við vissu, hvar hjartað lág.

- Eg vóni tó, at talan verður um rætta vinnaran, og at í øllum førum eitt av liðunum fer at megna at spæla seg fram til endaspælið í Japan og Korea.



*Vit ætlaðu at læna Jan eitt sindur av 12. mans útgerð til myndatøkuna, men hetta vísti seg at vera óneyðugt. Hann átti allar greiðirnar sjálvur*

***Myndir úr Zürich: Álvur Haraldsen***



*At hava eitt flagg í hvørjum kjálka,má sigast at vera eitt sindur av einari heilgardering*






# Prestainnsetan á Glyvrum

*Sunnudagin var fyrsti presturin í nýggja prestagjaldinum á Glyvrum innsettur*



*Nýggi glyvrapresturin, Meinhard Bjartalíð, saman við familjuni Mynd: Jens K. Vang*



*Bjarni Bæk, dómpróstur, innsetti Meinhard Bjartalíð sum sóknarprest á Glyvrum Mynd: Jens K. Vang*

Meinhard Bjartalíð varð sunnudagin av Bjarna Bæk, dómprósti, innsettur sum fyrsti sóknarprestur í nýstovnaða Glyvra prestagjaldi.

Hátíðarguðstænasta var sunnudagin í Glyvra Kirkju, har kirkjufólkið fekk høvið at hoyra og heilsa upp á nýggja prest teirra.

Nýggi presturin á Glyvrum, Meinhard Bjartalíð, er 34 ára gamal og ættaður úr Árnafirði. Hann tók teologikt embætisprógv í Århus í 1997 og hevur síðan verið prestur á Viðareiði, har hann hevur røkt kirkjusóknirnar á Viðoynni, Svínoy og Fugloy.

Frá1. oktober í ár er hann settur prestur í nýggja prestagjaldinum í Eysturoynni, sum umfatar bygdirnar Rituvík, Runavík, Saltangará, Glyvrar, Lambareiði, Lamba, Søldarfjørð og Skipanes.

Meinhard Bjartalíð er giftur við Mariu Dam úr Kollafirði, og tey eiga tvey børn, Hjørdis og Súna.

Eftir innsetanina sunnudagin var samkoma á Runavíkar Sjómansheimi, har kirkjuráð, prestar, próstur, biskupur og onnur vórðu boðin til døgurða.

**ej**

FARTELEFONIR
GSM
NMT 450 - NMT 900
Tráðleysar telefonir o. a.
Ymisk merki, so sum:
MOTOROLA
ERICSSON NOKIA Connecting People
PHILIPS BENEFON
SØLA & TÆNASTA
Storno Handan Á 6 - 100 Tórshavn
Tel. 314414 - Fax 318045

STARV sosialurin

## Fólk søkist

til Tíðindablaðið Sosialin, marknaðardeildin

Vit sóknast eftir einum fólki at taka sær av dagliga arbeiðinum við sølu av lýsingum og øðrum fyrifallandi uppgávum.
Herundir er ein uppgáva at verða við til at menna og reka Internet Sosialin.

Tú:
- Ert ágrytin
- Dugir væl at tosa í telefon
- Hevur lætt at tosa við fólk
- Hevur áhuga fyri telduarbeiði
- Ert før/ur fyri at arbeiða undir tíðartrýsti
- Hevur hugflog og dugir at festa tað á pappíri
- Dugir væl føroyskt
- Kanst byrja skjótast gjørligt

Vit kunnu bjóða:
- eitt spennandi og mennandi starv, har tú gerst partur av eini vælvirkandi marknaðardeild
- Samskifti innan- og uttanlands við viðskiftafólk okkara
- Áhugaverdar og fjølbroyttar uppgávur

Umsóknarfreistin er 12. oktober 2000.
Løn samb. avtalu.
Umsóknin skal saman við viðkomandi skjølum sendast til:

Sosialurin
P.O. Box 76
110 Tórshavn
Att.: Dagbjørt Hansen

Tú ert vælkomin at ringja tel. 311820 at hoyra meira um starvið.
Spyr eftir Dagbjørt ella send ein e-mail til:
dagbjort@sosialurin.fo

Vit eru allatíðina úti um okkum, og fimm ferðir um vikuna koma vit á gøtuna við einum nýggjum og feskum blað. Umframt tað verður blaðið hvønn dag lagt á internetið. Her starvast í dag uml. 25 fólk.

Sosialurin Sosialurin Sosialurin